7

# Alt gott til jólini á apotekinum

**Á apotekinum fært tú alt tað jólagóða, sum kann vera torført at finna aðrastaðni..**

**Stjørnuanis**
**Pommeransskal**
**Heilar kardamummur**
**Sildakrydd**
**Heilt kanel og nelikar**
**Gløggmix**
**Piparblandingar**
**Krydd til jólasnapsin**
**Jólate.. og mangt mangt annað..**



8



## Hjarta við dropaperlum

Seymaða hjartað er frá Húsarhaldsskúlanum í Klaksvík, har handarbeiði er ein av lærugreinunum

At brúka:
Toy
Plátuvatt el.l.
Perlur
Band

Mannagongd:
Tekna eitt hjarta og ger eina skabilón. Klipp tvey hjørtu úr toyi og minst til at leggja kant afturat til seyming. Drag perlur á bandið og legg millum stykkini niðri í endanum. Seyma allan vegin runt, men lat eitt lítið op verða í síðuni til fylluna. Fyll í og seyma fyri.

9

## Appilsinir

**At brúka:**
**Appilsinir**
**Heilar nelikar**
**Reytt band**

**Mannagongd:**
**Trýst nelikur inn í appilsinina í einum vøkrum mynstri. Bind band um. Hong tær upp ella legg tær í eina skál.**



10



## *Kærleikskalendari*

*Ger ein vaksna-jóla-kalendara við erotiskum gávum: Morgunmat upp á song, massaga, eitt lítið, ein stuttsøga, eitt bræv, undirklæðir...*